# Danski umhvørvismálaráðharrin vitjar

**Í gjár kom danski umhvørvismálaráðharrin, Connie Hedegaard, á vitjan í Føroyum. Talan er ikki um nakra almenna vitjan, men um ein arbeiðsfund við umboð fyri landsstýrið**

POLTISK VITJAN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Í hesum døgum er danski umhvørvismálaráðharrin, Connie Hedegaard, á vitjan í Føroyum, har hon hevur fund við starvsfelaga sín, Jógvan við Keldu, umframt Jóannes Eidesgaard, løgmann og Bjørn Kalsø, landsstýrismann í fiskivinnumálum.*

*Mynd: Jakob Dall*

Connie Hedegaard kom til landið stutt fyri døgurða mikudagin, og leiðin gekk beina kós til Havnar, har hon var til døgurða saman við ríkisumboðinum.

### Skal kunnast um orkuverkætlanir

Tað er Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í umhvørvismálum, ið hevur boðið danska ráðharranum til Føroya, og tey bæði høvdu ein fund beint eftir døgurða mikudagin.

Á fundinum millum tey bæði vóru fleiri mál viðgjørd.

Millum hesi mál vóru eitt nú støðan og avbjóðingar innan altjóða havumhvørvissamstarv, nýggja havumhvørvisverndarlógin, samstarv millum Innlendismálaráðið og danska Miljøministeriet, og eisini var Kyoto-protokollin umrødd.

Vitjanin hjá Connie Hedegaard í Føroyum er ikki drúgv, tí longu seinnapartin í dag gongur leiðin aftur til Danmarkar og Christiansborg.

Men danski umhvørvismálaráðharrin røkkur tó ein fund fyrrapartin í dag, tá ið hon skal á fund við Jóannes Eidesgaard, løgmann og Bjørn Kalsø, landsstýrismann í fiskivinnumálum. Á hesum fundi verður tað fyrst og fremst CITES-sáttmálin, ið verður viðgjørdur. Connie Hedegaard fer á vitjanini í Føroyum eisini at fáa kunning um eitt nú alduorkuætlanina hjá Seawave og vind- og vatnorkuverkætlanina hjá Sp/F Røkt í Vestmanna.

# Hetlendingar vilja nýta føroysk veðurtíðindi

**Týsdagin hevði hetlendska heimastýrið fund, og á fundinum var tosað um at keypa tænastur frá føroysku veðurstøðini**

VEÐURTÍÐINDI

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Hetlendingar halda, at tíðindini frá føroysku veðurstøðini eru so nágreinilig og álítandi, at teir hava ætlanir um keypa tænastu frá føroysku støðini.*

*Savnsmynd*

Sum nú er, fáa hetlendingar síni veðurtíðindi frá Aberdeen Met Office, men hendan veðurstøðin er í vanda fyri at verða stongd, skrivar Shetland News mikudagin. Tí er tað, at hetlendingar eru farnir at umrøða møguleikan fyri at keypa veðurtíðindi úr Føroyum.

### Føroysku tíðindini betur enn tey bretsku

Ein av limunum í hetlendska heimastýrinum, Josie Simpson, er gamal skipari, og hann segði á fundinum, at føroysku veðurtíðindini eru nógv meiri viðkomandi og nógv meiri nágreinilig enn tíðindini frá bretsku veðurtænastuni.

Gussie Angus, ein annar av limunum í hetlendska heimastýrinum, legði afturat á fundinum, at føroyingar fáa sínar veðurupplýsingar frá UK Met Office, men at føroyska veðurstøðin gjørdi nógv meiri nyttu úr upplýsingunum, og at føroyingar duga betur at greina tíðindini. Gussie Angus helt tað verða skilagott, um hetlendingar settu seg í samband við føroysku veðurstøðina at kanna, hvørjar tænastur ið hon kann veita hetlendingum.

Í mun til bretar leggja føroyingar størri dent á veðrið á sjónum, og her hava føroyingar og hetlendingar felags áhugamál. Tað hevur eisini stóran týdning fyri hetlendingar og sjóvinnuna kring Hetland, at skipini fáa álítandi og nágreinilig veðurtíðindi, ikki minst havandi í huga, at størsti oljuterminalurin í Evropa, Sullom Voe, liggur í Hetlandi.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa viðmerkingar til hetlendsku ætlanirnar frá føroysku veðurstøðini áðrenn evstamark hjá blaðnum.

# Úlfhamssaga - runnin úr Ringi Haranna

**Í dag verður nýggi leigurin, Úlfhamssaga, við tónleiki eftir Eivør Pálsdóttir, sýndur í Norðurlandahúsinum. Talan er um ein sterkan og vakran leik, har dansur møtir yrkingalist**

SJÓNLEIKUR

Úlfhamssaga er ein sterkur og vakur leikur, har dansur møtir gamlari yrkingalist. Hetta er ein spennandi søga, ið rennur í æðrum Ringi Harranna, har kærleiki traðkar fram á vakrasta hátt við úlvum, gandi og kríggi. Eitt framúrskarandi ævintýr sum speglar menniskjans djúpu sál: ljósið og myrkrið. Menn og kvinnur mugu standa saman til tess at loysa trupulleikar og vinna bardagan yvir tí ónda.

Leikurin varð skaptur burtur úr tøttum samstarvi millum Mariu Ellingsen, Eivør Pálsdóttir, Snorra Freyr Hilmarsson og Rejo Kela, ekspermenterandi dansari úr Finnlandi. Teksturin er skrivaður av unga íslendska yrkjaranum, Andri Snær Magnason. Og vinnandi liðið í íslendskari sniðgeving av búnum, skortum, ljósi og pallsniði arbeiddi við í framleiðsluni.

Tíggju sjóleikarar leika við liðina á Eivør Pálsdóttir, sum framførir sínu egnu løg, skrivað serliga til leikin.

– Vit vilja skapa ein bólk av norðurlendskum listafólki, gomlum yrkingum mótvegis dansileiki. Vit hava eina hugmynd um eitt leiklistarligt tiltak á ein serstakan stílførdan hátt, har vit hoyra tónleik við einum frumkendum Norðurlendskum tóna, meðan søgan trínur sterkt sjónliga fram við dansi og drama,, sigur Maria Ellingsen.

»Rímur« er siðbundni hátturin at greiða frá søgu við at syngja yrkingar. Hetta hevur gevur teimum eitt byrjunarstað í tónleikinum og rútmunum, ið eru heldur óvanligt.

– Móður mín er úr Føroyum, so eg eri uppvaksin við rímum, og tá eg hoyrdi Eivør Pálsdóttir syngja í Føroyum visti eg, at hon var tann rætta at skriva tónleikin. Hon tók arbeiðið á seg, og hóast hennara unga aldur var hon ikki bangin fyri at taka ábyrgd fyri øllum tónleiki og ljóði til alla framleiðsluna av leikinumum.

– Hon arbeiddi tætt saman við mær og sjónleikarunum og improviseraði seg fram gjøgnum tilfarið. At enda avgjørdu vit, at hon skuldi verða partur av stykkinum og stýra hugalagnum av søguni við egnum tónleiki, trummusláttri og sangi, sigur hon.

Úlfhamssaga fekk góða móttøku í Íslandi. Framførslurnar vóru útseldar, og leikurin fekk sjey innstillingar til The Icelandic Theater Prize »GRÍMAN«. Ljósið vann ein prís, somuleiðis sum Eivør Pálsdóttir vann fyri sín tónleik.

Úlfhamssaga varðar í 2 tímar við steðgi og er væl hóskandi øllumúr 10 til 100 ár.

Bara tvær sýningar verða, og verða báðar í dag, 1. september kl: 18.00 og kl: 21.00.

Atgongumerkini eru til sølu í Norðurlandahúsinum og í Kunningarstovuni í Havn og í Runavík.

